LangOER

# Samandráttur av granskingarúrslitum

# Opið útbúgvingartilfar á tínum egna máli, soleiðis sum tú vilt hava tað



http://langoer.eun.org

### Rithøvundar

**Monique Udnaes, Gard Titlestad and Øystein Johannessen**

### Gjøgnumlestur

Í tilgongdini hava vit fingið viðmerkingar og íkast frá verkætlanarfelagum og nógvum altjóða serfrøðingum. Vit vilja takka øllum!

### Verkætlanar felagar

**Cor van der Meer, Marit Bijlsma,** Fryske Akademy, Niðurlond (Verkætlanarsamskipan)

**Katerina Zourou, Giulia Torresin, Ioannis Lefkos,** Web2Learn, Grikkaland (Verkætlanarleiðsla)

**Elena Shulman, Valentina Garoia,** European Schoolnet, Belgia

**Sylvi Vigmo, Linda Bradley,** University of Gothenburg, Svøríki

**Malgorzata Kurek, Anna Skowron,** Jan Dlugosz University, Póland

**Vaiva Zuzeviciute**, Mykolas Romeris University**,** Litavia

**Gard Titlestad, Monique Udnaes, Øystein Johannessen,** International Council for Open and Distance Education, Noreg

**Anne-Christin Tannhäuser**, European Foundation for Quality in E-learning, Belgia

**Sanita Lazdina, Ilga Suplinska**, Rezekne Higher Education Institution**,** Lettland

### Grafiskur sniðgevi

**Stefanos Xenakis** www.steartworks.com

### Umsetarar:

Helena Egholm og Ólavur Ellefsen

### Fylg okkum

Twitter **#LangOER**

Slideshare **LangOER**

Mendeley **LangOER: OER and languages**

Diigo Group **Best content in OER and languages**

Facebook **LangOER Teachers group**

**langoer@eun.org**

Rættindini til hetta verk eru sambært Creative Commons Høvundaávísing 4.0 Altjóða Loyvi Creative Commons Attribution 4.0 International License.

Lifelong Learning

Hendan verkætlanin varð fíggjað við stuðuli frá Evropisku Kommissjónini. Rithøvundarnir hava fulla ábyrgd av hesi útgávuni og Kommisjónin hevur ikki ábyrgd fyri nakrari nýtslu av upplýsingum í henni.

Útgávudagur: 7. januar 2015. Vinarliga sitera soleiðis: **Udnaes, M., Titlestad, G., Johannessen, Ø. (2014).** ***Policy Brief - Open Educational Resources in your Own Language, in your Way.*** **LangOER consortium http://langoer.eun.org/.**

## 1.0 Samandráttur í høvuðsheitum

Átøkini at lata upp útbúgving og opið útbúgvingartilfar (OÚT), á enskum Open Educational Resources (OER), gerast í størri mun partur av undirvísingardagsskránni hjá nógvum londum runt um í Evropa og verða raðfest frammarlaga. Frá at hava livað eina skuggatilveru, førkar OÚT seg inn á útbúgvingarliga heimspallin.[1] Tó haltar tilgongdin at brúka OÚT innan fámentu málini, serstakliga samanborið við tað enska.

Fyri at staðfesta týdningin av, at samfeløg velja at nýta opið útbúgvingartilfar á teirra egna máli, verður tilmælt:

- **At stjórnir íverkseta politikkir, ið stuðla opnum útbúgvingartilfari í fámentum málum.**
- **At stjórnir í samstarvi millum tað privata, tað almenna og útbúgvingargeiran skipa marknaðir og samstarvspallar til frama fyri dygdargott opið útbúgvingartilfar.**
- **At stjórnir gerast oddvitar í menningini av opnum rammuskráum og standardum fyri at lætta um samstarv millum OÚT-goymslur og -skipanir (veita og góðtaka útbúgvingarinnihald, hava sambæriligan nýtsluritbúnað og kontekstualiseraðar veitingar).**

Samanborið við annað útbúgvingartilfar, bjóðar opið útbúgvingartilfar serligar fyrimunir. Sereyðkennini við OÚT at varðveita, endurnýta, endurskoða, broyta og útgeva av nýggjum, geva óteljandi fyrimunir, tí OÚT:

- Loyvir lógligari víðfevndari og ókeypis nýtslu av tilfari.
- Økir um atgongd til ódýra útbúgving.
- Betrar um góðskustýring av frálærutilfari, sum lærandi brúka.
- Ger nýskapan, skapanarevni og burðardygga nýtslu møguliga.
- Ger tað møguligt at menna skeið og skeiðsrøðir skjótari.
- Minkar um útreiðslurnar at veita læring á netinum og blandaða læring.
- Ger dygdargott tilfar tøkt á netinum altíð.

## 2. Inngangur

### 2.1. Allýsingar

“Opið útbúgvingartilfar” er allýst í “Paris OER Declaration (UNESCO)” frá 2012 og ljóðar soleiðis: “frálæru-, lærings- og granskingar-tilfar av øllum slag, talgilt ella annað, sum liggur í almenna rúminum ella sum er útgivið undir opnum loyvi, ið gevur øllum óskerda, ókeypis atgongd til at nýta, tillaga og útbreiða av nýggjum við ongum ella fáum

[1] Weller M. (2014). The battle for Open. http://www.ubiquitypress.com/site/books/detail/11/battle-for-open

avmarkingum. Opin loyvisgevan virkar innan rammulógina fyri hugverksrætt og er allýst sambært altjóða konvensjónum og virðir upphavið av verkunum".

OÚT og opin stórskeið á netinum (kend sum MOOCs) eru tveir týdningarmiklir partar av opnari útbúgving. Í hesum samandráttinum fara vit tó at miðsavna okkum um OÚT.

Tørvurin á at stuðla menningini av OÚT innan fáment mál ("Less Used Languages") er stórur í Evropa. Meginparturin av borgarum í evropisku londunum hava antin eitt fáment mál sum høvuðsmál, so sum estiskt, norskt og rumenskt – um samanborið verður við heimsmálini (og mest nýttu málini), serstakliga enskt – ella fevna londini um eitt ella fleiri samfeløg við fámentum málum, so sum frísiskt ella sámiskt.

## 2.2. Núverandi støðan

Seinastu árini hava stjórnir í Evropa lagt fram ætlanir ella samtykt kunngerðir, ið stuðla opnari útbúgving, men fáar vísa beinleiðis til OÚT.

Á altjóða støði skipaðu UNESCO (United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization) og CoL (Commonwealth of Learning) fyri "World OER Congress" í 2012. Her varð "Paris OER Declaration" samtykt. Samtyktin heitir á alheims stjórnir, um at lata alment stuðlað útbúgvingartilfar verða opið fyri øll. Ein av samtyktunum var, at "styrkja menning av strategium og politikkum innan OÚT, stuðla menning av serstøkum politikkum fyri at stimbra framleiðslu og nýtslu av OÚT sum partar av breiðari útbúgvingarætlanum". Fyri stuttum heittu stjórar og rektarar, ið umboða eina viftu av hægri lærdum háskúlum kring heimin, á ICDE og UNESCO um at halda fram við teirra arbeiði at stuðla og eggja stjórnum at "stimbra nýtsluna av opnum útbúgvingartilfari".[2]

Í Evropa verður opið útbúgvingartilfar stuðlað av ES ráðnum, umvegis "Opening Up Education" átøkini at stimbra læring og frálæruhættir við kunningartøkni og talgildum innihaldi, í høvuðsheitum gjøgnum menning av OÚT og við at gera OÚT tøkt. Frágreiðingin, sum ein ES bólkur gjørdi í oktober 2014 um nýtímansgerð av hægri útbúgving, leggur stóran dent á týdningin "fullkomiliga opna atgongd til opið útbúgvingartilfar. Í sambandi við almenna útbjóðing átti at verið kravd treyt, at alt innihald skal kunna broytast, endurnýtast og nýtast aðrastaðni" (tilmæli 13).

Hóast tað í dag er ein ørgrynna av útbúgvingartilfari, sum er útgivið sum OÚT, er lítið tilfar á øðrum máli enn á enskum og enn minni innan fámentu málini.

---

[2] ICDE Media press, December 5, 2014. www.icde.org/Bali_message




Mynd 1: Talið á Creative Commons loyvdum verkum er vaksið úr 50 milliónum í 2006 til meira enn 1 milliard í dag. Tølini fevna um øll sløg av verkum.[3]

Sambært ES verkætlanini LangOER um dygdargott OÚT í fámentum málum, sær støðan í flestu londum døpur út, serliga um stranga allýsingin hjá UNESCO verður nýtt. Tó eru nøkur góð dømir um OÚT-tiltøk í Evropa, so sum Federica[4] í Italia, Periodica í Lettlandi (Latvian National Digital Library)[5], NDLA í Noregi[6], Scholaris í Pólandi (sum er mest framúrskarandi dømið um alment stuðlaðan OÚT pall)[7], RURA í Fraklandi[8] og Wikiwijs í Niðurlondum[9].

## 3. Hvørjir eru møguligir ágóðar hjá stjórnum, um tær velja at nýta, stuðla og eggja til nýtslu av opnum útbúgvingartilfari í fámentum málum?

### 3.1. Økt virkni

OECD (Organisation for Economic Co-operation and Development)[10] væntar, “at opin deiling fer at vaksa um menningina av nýggjum lærutilfari, stimbra innanhýsis betringar, nýskapan og endurnýtslu, umframt at hjálpa stovnum at skjalfesta tilfar og nýtsluna innan- og uttanhýsis”.

[3] https://stateof.creativecommons.org/report/
[4] http://www.federica.unina.it
[5] http://www.periodika.lv
[6] http://www.ndla.no
[7] http://scholaris.pl
[8] http://www.eul.education.fr/consultation/presentation/present/index.html
[9] http://wikiwijsleermiddelenplein.nl
[10] OECD’s report: Giving knowledge for free: the Emergence of Open Educational Resources”. http://www.oecd.org/edu/ceri/givingknowledgeforfreetheemergenceofopeneducationalresources.htm

OÚT goymslur á lokalum málum fara at draga at sær óformligar næmingabólkar, og OÚT fer at virka sum brúgv ímillum óformliga læring og siðbundnar útbúgvingar. Slíkar OÚT goymslur fara eisini skapa møguleikar fyri lívslanga læring, umframt stuðla áhaldandi yrkismenning.

Politiska tiltakið hjá ES um fleirmæli, kent sum Barcelona tiltakið (sum sigur, at allir borgarir eiga at tosa tvey mál afturat sínum egna móðurmáli) er ein haldgóð grundgeving fyri at stuðla menningini av OÚT í fámentum málum. ES-tiltakið um fleirmæli sæst aftur í øllum teirra átøkum innan mentan, ungdóm, sosiala inklusjón, lívlanga læring og arbeiði.

Tá ið OÚT hevur prógvað seg sjálvt, kann væntast, at tað fer at røkka út í allar útbúgvingarskipanir og longur enn tað. The History of Open Educational Resources Infographic vísir, hvussu OÚT síðan sína byrjan í universitetsskipanini 1999/2002, longu hevur breitt seg til onnur støð innan útbúgving.[11]

## 3.2. Bøtt góðska í læring og undirvísing

UNESCO[12] sigur, at “Fyri at tryggja væleydnaða læring og menning av intellekti, er tað alneyðugt, at barnsins móðurmál verður nýtt í formligari undirvísing”.

Henda sannroynd eigur at eggja stjórnum at virka fyri, at móðurmálið verður nýtt á netinum. Kortini, so vísir granskingin hjá Kornai[13] at “Hóast netið bjóðar nógvar møguleikar fyri læring á ymsum málum, verða færri enn 5 prosent av núverandi málum í heiminum nýtt á netinum”.

Nýtslan av OÚT í fámentum málum kann hava við sær, at undirvísarar og næmingar verða eggjaði til at luttaka í avgerandi hugsan og í námsfrøðiligum kjaki, sum er við til at betra um góðskuna av læring og undirvísing. Tilfar, sum kann endurnýtast og broytast, kann stuðla uppundir týdningin av lærarum sum avgerandi menniskjansligan kapital í menningini og røktini av undirvísingartilfari.

## 3.3. Møguligir kostnaðarsparingar

At alment stuðlað undirvísingartilfar verður útgivið sum OÚT merkir kostnaðarsparingar, tí at goldið verður ikki fleiri ferðir fyri tað sama. Harumframt hevur OÚT annað týðandi gagn og økt fíggjarligt avkast.

Stutt eftir at “París fráboðanin” um OÚT varð samtykt, skrivaðu Sir John Daniel, fyrrverandi fyrisitingarligur stjóri í Commonwealth of Learning, og David Killion,

[11] http://elearninginfographics.com/history-open-educational-resources-infographic/

[12] 2008 UNESCO report- Mother tongue matters: local language as a key to effective learning. http://www-01.sil.org/literacy/mother_tongue_matters.htm

[13] http://www.washingtonpost.com/blogs/worldviews/wp/2013/12/04/how-the-internet-is-killing-the-worlds-languages/

amerikanskur sendiharri í UNESCO, í blaðnum "The Guardian" í juli 2012: "við at vera smidligt og tøkt, hevur OÚT møguleika at loysa heimsfevnandi undirvísingarkreppuna og vera við til at tryggja burðardyggan fíggjarligan vøkstur – um stjórnir eru til reiðar at handla".

Fyri næmingar fer OÚT at lækka kostnaðin á lærubókum. Sambært Creative Commons, "hava næmingar spart 100 milliónir dollarar uppá opnar lærubøkur"[14]. Aðrar kanningar eru almannakunngjørdar, ið meta um møguligar kostnaðarsparingar hjá næmingum, grundað á opna atgongd til lærubøkur[15]. Frágreiðingin "The OER Evidence Report", ið OER Reseach Hub gav út, staðfestir í nýggjasta samandrátti, at "88.4% av næmingum siga, at møguleikin, sum OÚT gevur at lesa ókeypis, ávirkaði teirra avgerð um at nýta OÚT"[16].

Viðvíkjandi stovnum kann til dømis nevnast, at Broward College Online[17] árliga sparir 250.000 amerikanskar dollarar við at nýta OÚT lærubøkur.

### 3.4 Nýskapandi møguleikar

"79.4% av undirvísarum nýta OÚT at fáa nýggj hugskot og íblástur" sambært OER Evidence Report (útgivið av OER Research Hub).

OÚT letur upp fyri nýggjum metingarhættum. "Á stovnum, sum bjóða opnar útbúgvingartilgongdir (Open Educational Processes), verður OÚT alt meiri brúkt. Hættir at meta um góðsku, sum eitt nú staðfesting millum javnlíkar, grundan millum javnlíkar og ætlanir fyri metingar millum javnlíkar, verða nýttir til at góðkenna innihald", sambært G. Conole og U. Ehlers[18].

OÚT letur eisini upp fyri møguleikanum at flyta seg meira innanhýsis í Evropa. UNESCO OÚT bólkurin staðfestir, at alstórir møguleikar (málvarðveitsla og kveiking, umframt útbúgving og menning, ið kann minka um fátækradømi) fáast við at nýta OÚT á lokalum málum.[19]

At deila tilfar og vitan øðrvísi eru drívmegin í nýskapan innan útbúgving sambært Dirk Van Damme frá OECD/CERI [20]. Opið útbúgvingartilfar kann síggjast sum ein sosial nýskapan (ikki sum ein tøknilig), ið kann endurskapa (ikki kollvelta) útbúgving, um tað

---

[14] https://stateof.creativecommons.org/
[15] http: www.siyavula.com and http://education.gov.za/SiyavulaTextbooks/tabid/886/default.aspx
[16] https://oerresearchhub.files.wordpress.com/2014/11/oerrh-evidence-report-2014.pdf
[17] Broward College Online Case Study: http://www.oeconsortium.org/projects/showcases/oer-at-broward-college-online/
[18] http://www.icde.org/filestore/Resources/OPAL/OPALEhlersConoleNamibia.pdf
[19] Oates,L. (2009). Coming up short in the OER movement: African Language OERs http://ojs.stanford.edu/ojs/index.php/a2k/article/view/449/275l
[20] http://www.slideshare.net/OECDEDU/open-educational-resources-sharing-content-and-knowledge-differently-is-a-driver-of-innovation-in-education

verður leinkjað saman við ta vitan, vit hava um læring og til tørvin hjá undirvísarum. Eftir hansara áskoðan fer OÚT at opna ein glugga til, hvussu framtíðar samfeløg, vitanarstarvsfólk og undirvísarar fara at viðgera vitan: gjøgnum deiling, samstarv, yrkisfelagsskapir og annað.

## 4. Hvørjar eru størstu avbjóðingarnar hjá stjórnum í sambandi við at taka í nýtslu, arbeiða fyri og eggja til nýtslu av opnum útbúgvingartilfari innan fáment mál?

### 4.1. Trot á politikkum og kørmum og tørvurin á at fremja politikkir í verki

Sambært POERUP yvirlitinum, ið vísir evropiskar og altjóða politikkir, ið hava týdning í mun til økta nýtslu av OÚT, "eru sera fáir virknir tjóðarpolitikkir sum viðvíkja opnari útbúgving, og har teir finnast, stendur sera lítið um OÚT". Gransking vísir, at "skúlafólk virðismeta OÚT hugtakið og eru fús at royna tað"[21], men hava tørv á onkrum stuðli á tjóðar/stovnsligum stigi.

At fremja politikkir í verki krevur lyftir; ikki bert frá stjórnum, men eisini frá stovnum og einstaklingum. Tiltøk á grasrótarstigi skulu stuðlast av viðkomandi tjóðarpolitiskum átøkum og øvugt: eingir politikkir geva úrslit, um teir einans eru kunngerðir um ætlanir. Eitt viðkomandi dømi um, at tiltøk á grasrótarstigi verða stuðlaði av tjóðarpolitiskum átøkum, er Wikiwijs, ið er ein "OÚT pallur fyri lærarar, ið niðurlendska mentamálaráðið setti í verk fyri at stimbra menning og nýtslu av OÚT, og fyri at betra um atgongdina til talgilt undirvísingartilfar."[22]

Munadygg nýgerð og broyting hendir ofta í skurðpunktinum millum átøk úr erva og gerðir úr neðra. Tørvurin á tjóðarpolitikkum er alstórur at stimbra grasrótartiltøk. "Tað finnast mong tiltøk, stýrd úr erva, ið virka sum orkuveitarar í mun til at velja OÚT (serliga tá talan er um opnar lærubøkur), men politikkir at fremja átøk úr neðra eru sjáldsamir".[23]

Gongdin fram ímóti opinleika og upptøkuna av OÚT er týðilig, men avrikini verða tarnaði, partvíst vegna mótstøðu um opinleika. Politisk átøk kunnu broyta mótstøðuumhvørvið og stinga út í kortið, soleiðis at meira verður samrøtt og samstarvað á tjóðarligum og altjóða stigi.

### 4.2. Manglandi vitan um at dygdargott OÚT finst, kann nýtast og hevur ávirkan

"Franski námsfrøðiligi arvurin er á tremur við opnum tilfari, men hvørki lærarar ella næmingar eru vitandi um hetta, og duga ei heldur at endurnýta tað".[24]

---

[21] http://www.onlinelearningsurvey.com/reports/openingthecurriculum2014.pdf
[22] http://www.slideshare.net/GrainneConole/promoting-policy-uptake-for-oer-and-moocs
[23] OER Research Hub, OER Evidence Report 2013-2014
[24] http://unesdoc.unesco.org/images/0022/002286/228649e.pdf

At vita, hvar tilfarið liggur, er ein av stóru avbjóðingunum við at nýta OÚT, og vitanin um tøkar OÚT goymslur er lítil[25].

Tað eru sera fáar OÚT skrásetingarskipanir sosum POERUP, OER Research Hub[26] og LangOER verkætlanirnar. Orka verður løgd í at máta, hvørja ávirkan hesar skipanir hava, t.d. viðger granskingarverkætlanin ROER4D hetta. At útvega aftursvar frá OÚT-nýtarum er trupult, tí at tað mesta av OÚT er atkomiligt fyri øll og ikki er neyðugt at skráseta seg fyrst. Tískil eru flestu kortleggingartiltøk treytaði av, at nýtarar sjálvboðnir velja at skráseta seg.

Sambært E. Allen og J. Seaman “meta skúlafólk í USA dygdina á OÚT at vera á nøkurlunda sama stigi sum siðbundið undirvísingartilfar“. “Tann mest týðandi forðingin fyri OÚT upptøku er enn áskoðanin hjá skúlafólki um, at tað er orku- og tíðarkrevjandi at finna og meta um tilfarið”.[27]

Ein skuldi trúð, at smáir OÚT marknaðir (so sum OÚT í fámentum málum) ikki hava somu evnini at vera til, samanborið við tey størru, ið enska málið ræður yvir. Tó hava katalansku og walisisku OÚT marknaðirnir prógvað tað mótsatta: OÚT kunnu trívast og vaksa væl, hóast lítlan marknað.

### 4.3. Málsligar og mentanarligar forðingar í mun til nýtslu og endurnýtslu av OÚT

Mál verða av undirvísarum ofta sæð sum ein forðing heldur enn fyrimunur, tí undirvísarar eitt nú hava ilt við at handfara fleiri mál í eini skúlastovu. Afturat hesum manglar eisini tilvitska um, at fleirmæli kann ríka læringina.

Fyri at røkka fleirmæltum og smámálssamfeløgum í øllum Evropa, má tilfar “ferðast væl” – tað merkir, verða flytbært og kunna kontekstualiserast. Tilfarið má verða brúkbart og skal kunna tillagast av nýggjum, so tað kann nýtast í einum øðrum mentanarligum og málsligum samanhangi enn tí upprunaliga. Umseting av OÚT er ein møguleiki, men einans at umseta tilfarið, máar støðið undan at uppbyggja vitanarinnihaldið í tínum egna mentunarliga samanhangi. Um OÚT ikki verður bjóðað fram í fámentum málum, fara næmingar og undirvísarar at leita sær til høvuðsmálini, sum síðani kann elva til, at útbúgvingartilfar á smærru málunum alsamt viknar.

### 4.4. Trot á góðum myndlum

Sundurbýting, ótti fyri lægri góðsku, trot á eggjan, veikur marknaður og aðrar avbjóðingar kunnu taklast og basast, um farið verður til verka vistfrøðiliga at skapa og nýta dygdargott OÚT. Í Noregi er ein tílíkur myndil mentur (sí boks 3) til

[25] OER Research Hub http://oerresearchhub.org
[26] OER Research Hub http://oerresearchhub.org
[27] http://www.onlinelearningsurvey.com/reports/openingthecurriculum2014.pdf

miðnámsútbúgvingar. Myndilin byggir á sannføringina um, at útbúgving er ein almennur ágóði og at almennir pengar skulu nýtast til at menna undirvísingartilfar. Á henda hátt er møguligt at útgeva tilfar undir Creative Commons loyvi og tískil verður tilfarið opið at nýta, endurnýta, broyta, tillaga og útbreiða av nýggjum. Valda OÚT vistfrøðiskipanin lættir um tilgongdina at gera OÚT alt meira vanligt millum fólk. "National Digital Learning Arena (NDLA)" er nevnt í tilmælinum í parti 5.2.

### 4.5. Mentanin at deila opið er ikki fatað, góðtikin og rótfest í útbúgvingarskipanini

Mentanin og vanarnir í prentaða heiminum og siðbundna útgávugeiranum eru flutt til talgilda heimin, men eiga at verða beind á aðra kós. OÚT verða enn sæð sum (og eru) eina hóttan móti forlagsvinnuni. Mentanin at deila opið er enn ikki fatað, góðtikin og rótfest í útbúgvingarskipanini.

## 5. Politisk tilmælir

Fleiri viðleikarar eru komnir við politisk vendum skjølum, ið kunnu nýtast sum íblástur, tá tjóðarpolitikkir skulu gerast fyri OÚT: EU High Level Group[28], Open Policy registry[29] (dømir um politikkir, sum eru góðkendir í tjóðarstovnum á statsstigi), Open Policy Network[30] (veitir hjálp til tey, ið taka avgerðir, til politikkmenning og til yvirlitsamboð ment av OER Africa). Sameinda ICDE – UNESCO politikforumið[31] skjýtur upp fleiri politikkir, ið geva eina heildaráskoðan í mun til opna útbúgving, OÚT og opna atgongd.

UNESCO IITE[32] landafrágreiðingarnar geva yvirlit, sjónarhorn og tilmælir, so sum frágreiðingin úr Fraklandi, ið varð útgivin í oktober 2014.

**Okkara niðurstøða er, at fyri at fremja OÚT í fámentum málum, eiga stjórnir**:

- **At íverkseta politikkir, ið stuðla opnum útbúgvingartilfari í fámentum málum.**
- **Í samstarvi millum tað privata, tað almenna og útbúgvingargeiran at skipa marknaðir og samstarvspallar til frama fyri dygdargott opið útbúgvingartilfar.**
- **At gerast oddvitar í menningini av opnum rammuskráum og standardum fyri at lætta um samstarv millum OÚT-goymslur og -skipanir (veita og góðtaka útbúgvingarinnihald, hava sambæriligan nýtsluritbúnað og kontekstualiseraðar veitingar).**

---

[28] *EU High Level Group calls for targeted funding to boost use of new technologies in higher education.* http://europa.eu/rapid/press-release_IP-14-1188_en.htm
[29] Open policy registry: https://wiki.creativecommons.org/OER_Policy_Registry
[30] Open policy Network: https://openpolicynetwork.org
[31] http://icde.org/en/.b7C_wRrOXp.ips
[32] Touzé S. (2014). Open educational Resources in France: Overview, perspectives and Recommendations.UNESCO IIETE: Moscow. http://unesdoc.unesco.org/images/0022/002286/228649e.pdf

### 5.1. Stjórnir eiga at íverkseta politikkir, ið stuðla opnum útbúgvingartilfari í fámentum málum

Fyri at fata, hvørjir allir ágóðarnir av OÚT og læring eru í málsligum høpi, eiga stjórnir at menna ein samanhangandi heildarpolitik fyri menning og nýtslu av OÚT á teirra egna máli. Politikkir eiga at viðgera stórmál, so sum fígging, førleikamenning og deiling, umframt møgulig løgfrøðislig viðurskifti. Tileggjan, eftirlit og metingarmekanismur eiga at verða tikin við í tjóðar- og stovnspolitikkum.

Samstundis sum tjóðarpolitikkir eru kjarnin í okkara tilmæli, eru politikkir á lokalum stigi og á stovnum eisini avgerandi fyri, hvussu tað fer at eydnast at útbreiða OÚT.

Politiskar avgerðir, sum stuðla OÚT í fámentum málunum, eru avgerandi fyri, at tað skal eydnast OÚT at verða brúkt, og fyri at fáa sum mest burturúr fyrimununum.

### Boks 1. Dømi um opnar lærubøkur: Vesturkanadisk OÚT

> “Í apríl 2014 undirskrivaðu tríggir vesturkanadiskir landslutir undir eina felagsavtalu, har samtykt varð at samstarva og deilast um at nýta og tillaga OÚT. Hetta byggir á tiltakið hjá British Columbia Ministry of Advanced Education frá oktober 2012, ið stuðlar menningini av opnum lærubókum til 40 av teimum fakunum, sum hava flest næmingar tilmeldaðar í almennum miðnámsskúlunum. Í mei 2014 fekk tiltakið fíggjarligan stuðul til 20 opnar lærubøkur afturat til yrkis- og tekniskar útbúgvingar. Mentamálarráðið í Alberta hevur eisini bundið seg til at veita 2 milliónir amerikanskar dollarar til, í samstarv við hinar landslutirnar, at stuðla OÚT”, sigur Rory McGreal, ICDE formaður í OÚT

### Boks 2. Niðurlond: Wikiwijs tiltakið

> “Wikiwijs er ein skipan, stýrd úr erva, sum varð sett í verk í 2008 av mentamálaráðnum. Alt innihald í goymsluni er tøkt umvegis Creative Commons Attribution ella Attribution-Share Alike loyvum. Wikiwijs hevur eina góðskutryggingarmekanismu, har javnlíkar meta um tilfarið hjá hvørjum øðrum, umframt góðskustempul, sum eru góðkend av samstarvandi stovnum. Endamálið við Wikiwijs er ikki einans at økja um framleiðsluna og nýtsluna av OÚT, men eisini at stuðla undirvísarum í at professionalisera seg og gera teirra egna undirvísingartilfar ella skeið. Skipanin gevur niðurlendskum undirvísarum atgongd til 650.000 byggikubbar av innihaldi og 35.000 fyrilestrar. Í februar 2014 greiddi Robert Schuwer frá the Open University í Niðurlondum í orðaskiftinum um "Really Open education" í ES-tinginum frá, at hollendska stjórnin fyri stuttum hevur kunngjørt eina skipan, sum

árliga fer at veita 1 millión evrur til menning av opnari útbúgving á hægri stigi á netinum.”[33]

## 5.2 Stjórnir eiga í samstarvi við tað privata, tað almenna og útbúgvingargeiran at skipa marknaðir og samstarvspallar til frama fyri dygdargott opið útbúgvingartilfar

OÚT samfelagið og teir partar, sum møguliga hava áhuga í OÚT, eru sundurbýttir og tørva felagspallir í mun til samstarv, fíggjarligan stuðul og menning. Á tjóðarstigi kundu stjórnir og stovnar umhugsað at eggja til netverkan, ið kann virka sum katalysatorur fyri øktum samstarvi og nýskapan innan OÚT. Samstarv eigur at fevna um møguleikan fyri samstarvi millum privata og almenna geiran (private-public partnerships).

Tá hugsað verður um myndlar og hugskot til pallar og marknaðir, eiga vit at umhugsa víðaribygging og tillagan av verandi væleydnaðum bygnaðum, sum eitt nú norska NDLA myndilin. Myndlar, ið skulu stimbra og eggja upptøkuna av OÚT í fámentum málum, skulu leggja dent á fylgjandi:

- Akademisk starvsfólk, undirvísarar og útbugvingargeirin skulu roknast upp í lívsringrásina.
- Skapan og framleiðsla av OÚT.
- Nýtsla av almennum ella stovnsligum innkeypi, tá tað er relevant.
- Góðskutrygging.
- Goymslu.
- Brúkaravinarliga atgongd.
- Eyðmerkja nýggjar tørvir á OÚT.

[33] http://oerpolicy.eu/really-open-education-policy-discussion-in-the-european-parliament-18th-february-2014

## Boks 3:  Dømi um eina landsfevnandi og virkandi OÚT vistfrøðiskipan: National Digital Learning Arena (NDLA) í Noregi

Í 2006 kunngjørdi norska mentamálaraáðið, at tey ætlaðu at játta 50 milliónir norskar krónur til talgilt útbúgvingartilfar á miðnámsútbúgvingum. Fylkiskommunurnar fingu, umvegis eina lógarbroyting, ábyrgdina av prentaðum og talgildum útbúgvingartilfari. Fylkiskommunurnar settu í verk eitt samstarv um at veita opið talgilt útbúgvingartilfar. Hetta samstarv eitur í dag NDLA. Tað inndregur marknaðin, undirvísarar og næmingar í allar tilgongdir. Núverandi árliga rakstraræltanin er á leið 8 milliónir evrur. NDLA er ein tykisligur stovnur. Fyrisitingarliga tilfeingið er savnað saman frá fylkjunum fyri at tryggja, at útreiðslurnar eru so lágar sum gjørligt.




NDLA er alment partafelag, ið 18 (av 19) fylkiskommunur í Noregi eiga saman. Endamálið er at útvega dygdargott opið talgilt útbúgvingartilfar (OÚT) innan øll fak á miðnámsstigi.

Mynd 2: Dømið um NDLA vísir, hvussu almenni ognarskapurin av landsins skúlaskipan og einum OÚT stovni styðjar einum burðardyggum marknaði innan bæði siðbundið og opið útbúgvingartilfar.

## 5.3. Stjórnir eiga at gerast oddvitar í menningini av opnum rammuskráum og standardum fyri at lætta um samstarv millum OÚT-goymslur og -skipanir (veita og góðtaka útbúgvingarinnihald, hava sambæriligan nýtsluritbúnað og kontekstualiseraðar veitingar).

Fyri at fáa sum mest burturúr ágóðunum, ið OÚT hevur at bjóða, eiga OÚT-goymslur og -skipanir at verða opnar fyri nýtslu tvørtur um mál, mentanir og lond.

Ómakaleys atgongd til dygdargott OÚT tvørtur um stovnar, mál og lond hevði verið eitt týðandi avrik fyri næmingar, undirvísarar og útbúgvingarskipanina sum heild og hevði eisini lætt um mentanarligu upptøkuna av OÚT.

Fyri at ómakaleys atgongd kann bera til, krevst, at fleiri viðurskifti verða loyst og virka saman: umseting, merkingafrøði og metadáta, at pallar virka saman og at innihaldið er atkomiligt.

Atkoman og virði á OÚT innan høvuðsmálini, sum eitt nú enskt, eiga ikki at verða sæð sum eina hóttan, men heldur sum ein møguleika at tillaga OÚT til lokal mál og mentanir.

Goymslur, ið geva atgongd til OÚT, hava tørv á standardum og flokkingarkørmum bæði á tjóðarstigi og altjóða stigi, soleiðis at goymslurnar lættliga kunnu eyðmerkjast og eru atkomiligar tvørtum um stovnar, lond og mál. Javngjørdir innflutnings/útflutnings hentleikar til OÚT eiga eisini at verða nýttir fyri at leysgeva tilfarið.

Sum víst í 4.1, eru forðingar við at finna, meta um og nýta OÚT ein stór avbjóðing í mun til at víðka um upptøkuna av OÚT. Um vit kunnu bjóða nýtaravinarliga og ómakaleysa atgongd til dygdargott OÚT, kann OÚT eftir okkara tykki gerast ein avgerandi broyting innan útbúgving.

Hetta er eitt langtíðarpolitiskt tilmæli, sum millumtjóða stovnar og viðleikarar sum UNESCO, ES og onnur, mugu taka støðu til skjótast gjørligt.

Høvuðheimildir

Bradley, L. & Vigmo, S. (2014). *Open Educational Resources (OER) in less used languages: a state of the art report.* LangOER consortium http://langoer.eun.org/

de los Arcos, B., Farrow, R., Perryman, L.-A., Pitt, R. & Weller, M. (2014*). OER Evidence Report 2013-2014.* OER Research Hub. http://oerresearchhub.org/about-2/reports/

European Commission. Press release: EU High Level Group calls for targeted funding to boost use of new technologies in higher education, Brussels 22 October 2014 http://europa.eu/rapid/press-release_IP-14-1188_en.htm

Johnson, L., Adams Becker, S., Estrada, V., Freeman, A., Kampylis, P., Vuorikari, R., Punie, Y. (2014). *Horizon Report Europe- 2014 Schools Edition*. Office of the European Union and The New Media Consortium https://ec.europa.eu/jrc/en/publication/eur-scientific-and-technical-research-reports/horizon-report-europe-2014-schools-edition

POERUP project (2014). Sero Consulting, Deliverable D4.1, *Overview of European and international policies relevant for the uptake of OER*. http://poerup.referata.com/w/images/POERUP_D4.1_Overview_of_European_and_international_policies_relevant_for_the_uptake_of_OER_v1.0.pdf

Van Damme, D (2014) "Open educational resources: sharing content and knowledge differently as a driver of innovation in education" Opening keynote at the OER Konferenz 2014 https://wikimedia.de/wiki/OERde14/Programm/keynote

Aðrar heimildir

Camilleri A., Ehlers U., Pawlowski J. (2014): *State of the Art Review of Quality Issues related to Open Educational Resources (OER).* JRC Scientific and Policy Reports. http://is.jrc.ec.europa.eu/pages/EAP/documents/201405JRC88304.pdf

Daniel, J., Killion, D. 2012. Are open educational resources the key to global economic growth? The Guardian Professional, July 4. http://www.theguardian.com/higher-education-network/blog/2012/jul/04/open-educational-resources-and-economic-growth

European Commission (2013) The Opening up Education initiative http://www.openeducationeuropa.eu/en/initiative

Kornai, A. (2013), *Digital Language Death* http://eprints.sztaki.hu/7564/1/Kornai_1_2441287_ny.pdf

Kozma, B. R. (2008). Comparative Analysis of Policies for ICT in Education. *In* Joke Voogt, Gerald Knezek (Eds.) *International Handbook of Information Technology in Primary and Secondary Education*, volume 20, pp 1083-1096. Springer

POERUP project (2014). Country reports. http://poerup.referata.com/wiki/Main_Page

Schwach, V., Mæsel, E. (2013). Pensum i høyere utdanning – hvilke læremidler brukes? Kartlegging av praksis i utvalgte fag. Rapport 29/2013.http://www.nifu.no/files/2013/11/NIFUrapport2013-29.pdf

Śliwowski, K., & Grodecka, K. (2013). *Open Educational Resources in Poland: Challenges and Opportunities*. UNESCO: Moscow. http://iite.unesco.org/publications/3214727/

UNESCO (2014) Education For All Global Monitoring Report 2013/2014. http://www.unesco.org/new/en/education/themes/leading-the-international-agenda/efareport

Wiley, D., Green C., & Soares, L. (2012). Dramatically bringing down the cost of education with OER: How open education resources unlock the door to free learning. Centre for American Progress and EDUCAUSE https://www.americanprogress.org/issues/labor/news/2012/02/07/11167/dramatically-bringing-down-the-cost-of-education-with-oer/

Zourou K. (2014). Why do OER matter for less used languages? Blog post, July 11 http://blogs.eun.org/langoer/2014/07/11/why-do-oer-matter-for-less-used-languages

**Aðrar viðkomandi leinkjur**

- UNESCO has a policymakers' toolkit for ICT in education: http://www.infodev.org/en/Project.11.html
- Language Policy in Estonia: http://www6.gencat.net/llengcat/noves/hm04primavera-estiu/docs/rannut.pdf
- British Columbia Campus OpenED: http://open.bccampus.ca/about-2/
- Example of national policy decision: India: http://www.col.org/blog/Lists/Posts/Post.aspx?ID=177
- Wales Open Education Declaration of Intent, Key Commitments: http://www.oerwales.ac.uk/?page_id=4
- What is Open Education: http://en.wikipedia.org/wiki/Open_education
- Mission of the Open University: http://www.open.ac.uk/about/main/mission
- OEC consortium: http://www.oeconsortium.org/about-oec/
- UNISA OER Policy: http://www.unisa.ac.za/default.asp?Cmd=ViewContent&ContentID=27755
- OER at the UK Open University: http://www.open.ac.uk/about/open-educational-resources/